## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Móttøka hjá Ingeborg



*Blómur og gávur í hópatali vórðu lætnar Ingeborg. Hon fegnaðist um tær allar, og tað gjørdi maður hennara, Andrew (uttast hm.) eisini*

FORKVINNA
*Orð/myndir: Snorri Brend*

Seinnapartin mikudagin varð hildin stór móttøka í húsunum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Henda varð hildin í samband við, at Ingeborg hevur verið forkvinna í felagnum seinastu 25 árini.

Nógv fólk var samankomið til móttøkuna, fyri at vísa henni tøkk og virðing fyri sítt ótroyttiliga arbeiði fyri korini hjá tí føroyska arbeiðsfólkinum.

Millum gestirnar vóru umboð úr fakfeløgum í Norðurlondum, løgmaður Jóannes Eidesgaard, eins og umboð fyri feløg og stovnar, sum á einhvønn hátt hava samstarvað ella samráðst við Ingeborg hesa fjórðingsøldina.

Fleiri røður vórðu hildnar, har m.a. varð víst á tað treystið, ið Ingeborg hevði víst og tað álit, hon hevur manna millum.

- Uttan hennara vóru vit komin stutt á leið við rættindum okkara, varð m.a. nevnt í onkrari røðu.



*Nógv takkaðu fyri tað stóra arbeiðið, sum Ingeborg hevur gjørt fyri arbeiðarastættina – her Sofie Haraldsen úr Miðvági*



*Tveir fakfelagsformenn stukku eisini inn á gólvið - nývaldi formaðurin í Lærarafelagnum. Magnus Tausen (vm.) og Jarvin F. Hansen (hm.) í Pedagogfelagnum*

# SALT-fløgan endurprentað



*SALT-fløgan varð skjótt útseld, men er nú aftur at fáa*

Í november mánaði 2004 gav sangbólkurin SALT út sína fyrstu fløgu.

Fløgan varð væl móttikin, og vísti tað seg skjótt at hon eisini var rættiliga væl umtókt.

Hon hevur verið nógv at hoyrt í útvarpinum, og nøkur av løgunum hava eisini verið við í 15 teimum bestu.

Longu í desember mánaði vóru øll 2.500 eintøkini seld, og gjørdist hon sostatt mest selda fløgan í 2004, hóast sølutíðin bert var 1 mánaður.

Fløgan varð eisini nominerað at vera ein av teimum trimum bestu fløgunum í sambandi við Atlantic Music Event.

Fløgan er nú endurprentað og øll tey mongu, sum hava bíðað eftir henni kunnu nú fáa hana til keyps í handlum kring landið.